betri trygging



# Frágreiðing um *burðardygd*

2025

Frágreiðingin er skrivað
í februar og mars 2026

betri trygging

# Innihald


1 Fororð ... 3

2 Um frágreiðingina ... 6

3 Um Betri Trygging ... 8

Søgan hjá Betri Trygging ... 9

Okkara virðisketa ... 10

Grundleggjandi vitan og yvirlit yvir ognir og aktiv ... 11

Bygnaðurin í fyritøkuni ... 12

4 Umhvørvi ... 13

Ringbúskapur ... 14

Orkunýtsla og útlát ... 15

Burturkastmongdir ... 16

5 Sosialt ... 17

Trivnaður, trygd og heilsa ... 18

At liva heilsugott og burðardygt ... 19

Heilsufremjan og trivnaður ... 20

Samfelagstilvit, stuðul og sponsorat ... 21

Familjuveltan ... 22

Falltrygd fyri eldri borgarar ... 25

Starvsfólk ... 26

6 Leiðsla ... 29

Leiðsla ... 30

# 1. Formáli



# Tað er í grundini *eitt sindur løgið …*

**… hetta, at allar fyritøkur ikki arbeiða burðardygt. Tí tað er jú so ómetaliga logiskt. Nýta vit meira, enn tilfeingi er til, saga vit greinina, vit sita á. Sama um tað snýr seg um náttúrutilfeingi, menniskjasligt tilfeingi ella sosialt og samfelagsligt tilfeingi. Vit mugu taka ábyrgd. Og vit gera tað fegin.**

Tað hevur altíð verið púra natúrligt hjá okkum at hava burðardygd við í arbeiðinum. Tí er tað eisini eitt av strategisku sporunum hjá Betri Trygging. Tí eru vit partur av felagsskapinum „Varandi Vinna" hjá Vinnuhúsinum, og tí skriva vit nú okkara fyrstu ESG-frágreiðing, hóast tað fyri okkum ikki er eitt lógarkrav.

Frágreiðingin verður í stóran mun grundað á okkara dupultu ávirkanargreining – vanliga nevnd DMA – sum vit á fyrsta sinni gjørdu í 2025. Frágreiðingin byggir eisini á onnur tøl, sum felagið hevur.

Í arbeiðinum hava vit staðfest 56 punkt í IRO (impact, risk og oppertunity), og kunnu nú fara meiri málrættað til verka.

Hóast vit eru ein vit eru ein vitanar- og tænastu-fyritøka, ið ikki beinleiðis troytir náttúrutilfeingi til framleiðslu, hava vit kortini í fleiri ár arbeitt miðvíst við burðardygd.

Tí – sum ein av sterkastu fyritøkunum í landinum, hava vit eina stóra ábyrgd.

## Ítøkilig mál

Í okkara strategi er burðardygd eitt av fokusøkjunum, tí vit vilja leggja okkum eftir at arbeiða við skilabetri tilfeingis- og orkunýtslu og burðardyggum íløgum. M.a. at umleggja bilar og bygningar til varandi orku, minka um burturkast, endurnýta tilfar.

Ein ítøkiligur málsetningur er til dømis, at akførini skuldu vera 50% burðardygg í 2023, og í 2030 skulu tey vera 100% burðardygg.

Eitt annað av málunum er, at bygningarnir hjá felagnum skulu verða 100% burðardyggir í 2030. Á hesum økinum gongur sum ætlað, og vit fara at náa málunum, vit hava sett okkum.

Síðani 2022 hava vit arbeitt við at økja um endurnýtsluna. Í 2025 var nøgdin av endurnýttum lutum økt við heili 147% í mun til 2021.

Síðani 2022 hava vit eisini arbeitt við at minka um post og prent. Í 2025 vóru útreiðslurnar til post og prent minkaðar heilt niður á 19% í mun til 2022.

Í 2025 høvdu vit hartil eitt stórt átak hjá øllum deildum í felagnum at sletta dátur á servaranum, so óneyðuga nógv orka ikki verður nýtt at goyma gamalt tilfar. Vit hava eisini gjørt fleiri ymisk átøk fyri at eggja starvsfólkinum til at liva meiri burðardygt og geva teimum vitan um burðardygd.

Vit arbeiða seriøst og miðvíst, og so hvørt, sum vit náa málunum, seta vit okkum nýggjar málsetningar, sum vit síðani arbeiða fram ímóti á fleiri frontum.

## Leggja um frá CSR til ESG

Henda ESG-frágreiðingin er ein annar máti at liva upp til krøvini, vit seta okkum sjálvum. Vit fara við hesum frá siðbundnu CSR-rapportini og førka okkum spakuliga yvir ímóti sjálvbodnu ESG-frágreiðingini. Í hesum føri er hon bygd á grundútgávuna av VSME-leisitnum.

Í nøkrum førum hava vit frávik frá grundútgávuni, tí vit framvegis ikki hava uppgjørt tølini ella hava tað dáta tøkt, sum frágreiðingin krevur.

Í øðrum førum hava vit sett tøl inn, sum í grundini hoyra til víðkaðu útgávuna, men sum vit kortini hava tikið við, tí vit kenna tey.

Sostatt skal henda fyrsta frágreiðingin lesast sum ein byrjan til at menna eina ESG-frágreiðing, meðan vit frameftir arbeiða uppá at fáa neyðugu tølini til vega og broyta mátan, vit higartil hava gjørt tølini upp.

Endamálið er sostatt at seta gongd á, so vit fáa betri samanberingargrundarlag og ein standard útrokningarleist, sum ger tað lættari at fylgja gongdini ár um ár.

Vit vilja vera við, har tingini verða flutt, og har vit kunnu gera mun.

Tí vit noyðast øll at gera okkara, skulu vit gera mun fyri umhvørvið.

Tað er jú so ómetaliga logiskt.

Ingunn Eiriksdóttir
Forstjóri Betri Trygging

# 2. Um frágreiðingina



# Um *frágreiðingina*

Henda fyrsta ESG-frágreiðingin hjá Betri Trygging tekur saman um árið 2025. Betri Trygging hevur í fleiri ár arbeitt miðvíst við burðardygd og eftir prinsippunum í CSR – Corporate Social Responsibility. Á hvørjum ári hava vit givið út eina CSR-rapport, nevnd Samfelagstilvit, ið eisini hevur fevnt um burðardygg átøk.

Eisini hava vit higartil havt tey 17 heimsmálini hjá ST sum grundarlag undir átøkum og arbeiði okkara.

Men nú fara vit frá tí leistinum. Frameftir fara vit at arbeiða eftir leistinum hjá Vinnuhúsinum fyri ESG-frágreiðingar útgávu 4 frá januar 2026

Henda fyrsta útgávan, ið er fyri árið 2025, er bygd á grundútgávuna – og á tøl, ið vit hava til taks.

Komandi árini fara vit at menna frágreiðingarnar og byggja uppá tað, ið er viðkomandi fyri okkum og virksemi okkara.

betri trygging

# 3. Um Betri Trygging

# *Søgan hjá Betri Trygging* byrjar 1. juli 1940




Tá valdaði ótryggleiki í Føroyum. Bæði um bretsku hermenninar og stóra heimskríggið. Størsti ótryggleikin valdaði tó um føroysku sluppirnar. Um menn, pápar, synir og brøður á havinum millum týskar minur og kavbátar.

Við krígsbyrjan kvettist sambandið við donsku tryggingarfeløgini, sum høvdu virkað í Føroyum. Men 1. juli 1940 varð „Samtakið Tryggingarfelagið Føroyar" stovnað – við Føroya brunatrygging, Føroya vanlukkutrygging, Føroya sjóvátrygging og nýggju Krígstryggingini fyri fiskifør. Hetta var eitt nýbrot, sum skapti nakað av tryggleika í ótryggleikanum - og áræði ímótloysinum.

Bara 25 dagar seinni – 25. juli – fórst fyrsta føroyska sluppin undir krígnum. Aldan sigldi av Vágsfirði, men kom ongantíð aftur. Seks menn sjólótust.

Nýggja føroyska tryggingarsamtakið nøktaði ein stóran tørv. Yvir 2.350 ferðir seldu føroyingar fisk í Bretlandi undir krígnum.

Tilsamans fórust 206 mans og 39 skip á túrunum. Í neyðini gjørdi tryggingarútgjaldið stóran mun – bæði so einkjurnar kundu forsyrgja børnunum, og so reiðararnir kundu keypa nýggj skip og vinnulívið halda á.
Hetta var okkara byrjan

Líka síðani hava vit skapt tryggleika í Føroyum. Støðugt hava vit ment virksemið á samhaldsfasta grundarlagnum: at vit hjálpast at, tá ið á stendur.

Vit síggja, at vit gera mun, tá fólk eru í sváraastu neyð. Í truplum støðum. Hóast vit hava lagt saman við øðrum feløgum, skift navn og samleika - so er kjarnuuppgáva okkara framvegis at skapa tryggleika.

At tryggja fólkini, sum eru tær kærast, og ognirnar, tú virðismetir mest. Vit eru við frá lívsbyrjan til lívsenda.

Vit eru Betri Trygging.

***Visjónin*** hjá Betri Trygging er at skapa tryggleika í Føroyum.

***Missiónin*** er at verða fremsta tryggingarfelag í landinum.

***Virkisøki*** okkara eru Føroyar, føroyingar og føroyskt vinnulív á sjógvi og landi.



TALVA 3

## Grundleggjandi *vitan*

| | | VSME-nr. |
|---|---|---|
| Slag av fyritøku | Partafelag | B1-24e |
| NACE vinnuflokking | K65.1 - Insurance | B1-24e |
| Fíggjarjavni | kr. 1.426.453 (190.958 EUR) | B1-24e |
| Nettoumsetningur | kr. 452.407 (60.563 EUR) | B1-24e |
| Ársverk | 90,46 | B1-24eB8-39 |
| Løntakarar | 98,25 | B1-24eB8-39 |

TALVA 4:

## Yvirlit yvir *ognir og aktiv*

*Vav 1 og 2*

| Ogn/aktiv | Bústaður | Postnr. | Bygd/býur | Land | Knattstøða | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Høvuðssæti | Kongabrúgvin | 100 | Tórshavn | Føroyar | 62.00931312852257, -6.7691829499493235 | B1-24e |
| Skaðatænasta | Smyrilsvegur 16 | 100 | Tórshavn | Føroyar | 62.021075993025825, -6.7673084960725625 | B1-24e |
| Deild | Sjógøta 17 | 800 | Tvøroyri | Føroyar | 61.555407926213164, -6.81299510722542 | B1-24e |
| Deild | Nólsoyar Páls gøta 9 | 700 | Klaksvík | Føroyar | 62.228608969741394, -6.585257356342371 | B1-24e |

*Vav 3*

| Ogn/aktiv | Bústaður | Postnr. | Bygd/býur | Land | Knattstøða | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Endurhýsing/ summarhús | Maritugøta 1 | 188 | Hoyvík | Føroyar | 62.029621807827745, -6.77358864213416 | B1-24e |
| Endurhýsing/ summarhús | Landavegur 94B | 100 | Tórshavn | Føroyar | 62.00406839884921, -6.799849157475795 | B1-24e |
| Summarhús | Í túni | 476 | Gjógv | Føroyar | 62.32549050992978, -6.943817907304205 | B1-24e |
| Summarhús | Mylnuvegur 3B | 466 | Ljósá | Føroyar | 62.26655899963583, -7.061591917955109 | B1-24e |
| Íbúð | Platanvej 4 | 1810 | Frederiksberg | Danmark | 55.67361427416398, 12.539904853885528 | B1-24e |

# Bygnaðurin í fyritøkuni



## Stjórn

**Nevnd:**

**Lars Bonde**, nevndarformaður
**Evy J. Jacobsen**, næstforkvinna
**Poula Michelsen**, nevndarlimur
**Mimi Steintórsdóttir**, nevndarlimur
**Teitur Samuelsen**, nevndarlimur
**Mortan Joensen**, starvsfólkavaldur nevndarlimur
**Marjun Thomsen**, starvsfólkavaldur nevndarlimur
**Jens Hjørleif Hansen**, starvsfólkavaldur nevndarlimur

**Forstjóri:**

**Ingunn Eiriksdóttir**

## Toppleiðsla

**Ingunn Eiriksdóttir,** forstjóri
**Virgar Dahl,** sjókundastjóri
**Heini Joensen,** fíggjarstjóri
**Henry Olsen,** vinnukundastjóri og privatkundastjóri
**Annika á Heygum,** skaðastjóri

## Víðkað leiðsla

**Barbara á Tjaldrafløtti,** leiðari á Stjórnarskrivstovuni
**Rannvá Justinussen,** HR- og Marknaðarleiðari
**Heini Bendtsen,** leiðari á KT-og talgilding
**Gunnar Grækarisson,** leiðari á Sýn
**Petur Elias Petersen,** leiðari á Kundadeildini
**Andrass Djurhuus,** leiðari Tvøroyri

## Deildirnar

**Høvuðssætið** er á Kongabrúnni í Havn.

**Deildir eru eisini í** Saltangará, í Klaksvík og á Tvøroyri

Í Havn er eisini bygningurin hjá **Skaðatænastuni.** Har kunnu vit reingera og goyma ognir hjá kundum, ið fáa skaða á húsini – eitt nú av eldi, stormi ella vatni.

**Summarhús og hús til endurhýsing** eru við Gjógv, við Ljósá, í Hoyvík, í Havn, í Klaksvík og á Tvøroyri.

Hartil er ein íbúð í Keypmannahavn.

betri trygging

# 4. Umhvørvi

# *Ringbúskapur,* orkunýtsla og burturkastviðgerð

Ringbúskapur snýr seg um at gagnnýta tilfeingið skilagott, so tað kann verða brúkt umaftur og umaftur í búskapinum. Endamálið er at skapa búskaparlig virði uttan at troyta okkara avmarkaða tilfeingi.

Seinastu árini hevur Betri Trygging arbeitt støðugt við at menna skipanir, sum í størri mun byggja á umvæling og endurnýtslu – heldur enn nýt-og-blaka-burtur-hugburðin.

Eitt nú hava vit fingið avtalu í lag við bilverkstøð um at endurnýta eykalutir, tá ið bilar fáa skaða. Hóast bilóhapp kunnu hava stóran skaða við sær, eru sum oftast hópatals eykalutir, sum kortini ikki fáa skaða og sum framvegis hava høga góðsku og langa livitíð.

Heldur enn at tveita góðu lutirnar burtur og keypa nýggjar, verða teir nú endurnýttir.

Sama prinsipp ger seg galdandi við telefonskaðum. Heldur enn at tveita burtur og keypa nýtt, hava vit avtalu við Føroya Tele um at umvæla telefonir og leggja dent á endurnýtslu.

Seinnu árini hava vit arbeitt miðvíst við at umleggja bygningar og bilar til grøna orku. Okkara mál er at hava lagt um til burðardyggar loysnir í 2030 - og tí málinum fara vit at náa.

TALVA 8

## Lýsing av *orkunýtslu*

| Orkunýtsla | Eind | 2025 | 2024 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|
| Fossil brennievni | MWh | 530,01 | 618,00 | B3-29 |
| Grøn/varandi brennievni | MWh | - | - | B3-29 |
| **Brennievni í alt** | **MWh** | **530,01** | **618,00** | **B3-29** |
| Fossil elnýtsla | MWh | 145,49 | 129,26 | B3-29 |
| Varandi elnýtsla | MWh | 147,14 | 131,53 | B3-29 |
| **Elnýtsla í alt** | **MWh** | **292,63** | **260,79** | **B3-29** |
| Fossil fjarhitanýtsla | MWh | - | - | B3-29 |
| Varandi fjarhitanýtsla | MWh | - | - | B3-29 |
| **Fjarhitanýtsla í alt** | **MWh** | **-** | **-** | **B3-29** |
| **Fossil orkunýtsla í alt[7]** | **MWh** | **675,50** | **747,25** | |
| **Varandi orkunýtsla í alt** | **MWh** | **147,14** | **131,53** | **B3-29** |
| **Samlað orkunýtsla** | **MWh** | **822,64** | **878,78** | **B3-29** |

TALVA 9

## Yvirlit yvir *útlát í vavi* 1, 2 og 3

| Útlát | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | VSMEnr. |
|---|---|---|---|---|---|
| $CO_2$ vav 1 | Tons $CO_2$ | 141,61 | 165,21 | 159,54 | B3-30 C3-54 |
| $CO_2$ vav 2 (locationbased) | Tons $CO_2$ | 96,73 | 74,04 | 70,65 | B3-30 C3-54 |
| **Samlað $CO_2$ vav 1 og 2** | **Tons $CO_2$** | **238,35** | **239,25** | **230,20** | **B3-30 C3-54** |
| $CO_2$-intensitetur | Tons $CO_2$/EUR | 0,00394 | 0,00414 | 0,00409 | B3-31 C3-54 |
| $CO_2$-intensitetur | Tons $CO_2$/kr. | 0,00053 | 0,00055 | 0,00055 | Ikki krav |
| Vav 3.5 Burturkast frá virkseminum | Tons $CO_2$ | 3,49 | 3,51 | N/A | C3-50- 54 |

TALVA 15

# *Burturkastmongdir* útgreinaðar eftir viðgerð

| ESG-lyklatal | Eind | 2025 | 2024 | VSMEnr. |
|---|---|---|---|---|
| **Endurnýtsla** Ikki vandamikið burturkast | Tons | - | - | B7-38a,b |
| **Endurnýtsla** Vandamikið burturkast | Tons | - | - | B7-38a,b |
| **Endurvinning** Ikki vandamikið burturkast | Tons | 2,34 | 2,27 | B7-38a,b |
| **Endurvinning** Vandamikið burturkast | Tons | 0,03 | 0,02 | B7-38a,b |
| **Brenning** Ikki vandamikið burturkast | Tons | 14,46 | 13,38 | B7-38a,b |
| **Brenning** Vandamikið burturkast | Tons | 0,33 | 0,39 | B7-38a,b |
| **Tyrving** Ikki vandamikið burturkast | Tons | 5,20 | 5,20 | B7-38a,b |
| **Tyrving** Vandamikið burturkast | Tons | - | - | B7-38a,b |
| **Samlað nøgd av burturkasti** | **Tons** | **22,36** | **21,26** | **B7-38a,b** |



# 5. Sosialt

# *Trivnaður,* trygd og heilsa

### Starvsfólkapolitikkur hjá Betri Trygging

Betri Trygging hevur í høvuðsheitum tríggjar meginreglur, tá um starvsfólkapolitikk ræður.

Fyrsta meginreglan er menning, og vit eggja starvsfólkinum til støðugan lærdóm. Nógvir lærlingar/starvsfólk arbeiða seg upp innanhýsis – frá lærlingi til deildarleiðara ella serfrøðing á ymsum økjum.

Onnur meginreglan er diversitetur – bæði vv kyni, aldri, royndum og fakligheit. Vit hava javnstøðu eftir 40–60 prinsippinum. Vit hava starvsfólk úr 20 til 68 ár. Og vit hava útvið 40 ymsar útbúgvingar.

Triðja meginreglan er inklusjón, sum vit arbeiða við uppá ymiskar mátar. Eitt nú eru øll við í strategiarbeiðinum fjórða hvørt ár, har høvi er at seta orð á rís og rós. Eisini hava vit sera nógv sosial tiltøk o.a.

Tølini tosa fyri seg. 1/3 av starvsfólkinum hevur ansennitet millum 10 og 47 ár, og 1/2 av teimum, sum gevast, hava verið í starvi yvir 20 ár.

### Benchmarka okkum móti teimum bestu í Norðurlondum

Betri Trygging vil vera Føroya besta arbeiðspláss. Tí benchmarka vit okkum móti líknandi arbeiðsplássum í Norðurlondum.

Seinasta kanningin, ENNOVA gjørdi millum feløg í okkara bólki, vísti, at Betri Trygging er Top in class og omanfyri benchmark bæði viðvíkjandi nøgdsemi, eldhuga, motivatión og trúfesti hjá starvsfólkinum.

Mentanin er sterk, samstarvið er fyrimyndarligt og samanhaldið er framúr.

Við sínum eldhuga stuðla starvsfólkini sjálv undir at halda arbeiðsplássið spennandi og mennandi, meðan vit sum felag støðugt skapa bestu karmar til bæði arbeiði, menning og trivnað.

Vit leggja eitt nú stóran dent á at geva starvsfólkinum bestu karmar til eitt heilsugott og burðardygt lív – við góðari javnvág millum arbeiði og frítíð.

# Stuðla starvsfólkinum í *at liva heilsugott og burðardygt*

Partur av starvsfólkapolitikkinum hjá Betri Trygging er, at vit tilvitað stuðla starvsfólkinum í at liva burðardygt, at liva heilsugott og í at trívast.

## Tá ið tað kemur til *burðardygd og umhvørvi,* hava vit:

- Latið øllum starvsfólkinum **bokashispann**
- **Burðardygga kantinu,** har vit eta restir hvønn fríggjadag
- Stovnað eina **familjueplaveltu** á Sandi
- **Regluligar vitanardeilingar, eitt nú við:**
  - IRF um **at skilja burturkast** og týdningin fyri umhvørvið
  - Um at **gagnnýta matrestir**
  - Um at **dyrka egið grønmeti**
  - Jesper Teilgaard, veðurfrøðingi, **um veðurlagsbroytingar**



## Tá ið tað kemur til *heilsufremjan í 2025,* hava vit:

- **Heilsuviku,**
  har dentur verður lagdur
  á heilsugóða lívið
  við ymsum átøkum
- **Vitanardeiling**
  við fysioterapeuti um
  fyribyrgjandi venjingar
- **Fitnessvenjing**
- **Flaggdagsrenning**
- **Faroe Express renning**
- **Viðgerð frá fysioterapeuti**
  á arbeiðsplássinum
- **Felags venjing**
  eitt nú padel, renning
  og gongutúrar
- **Saunagos og dipping**
- **Skrivstovusúkklur**
  – við deildarkappingum í heilsuvikuni
- **Morgunfimleikur**
  Øll savnast at gera morgunfimleik í felag

## Tá ið tað kemur til *trivnað í 2025,* hava vit:

- **Nógv sosial tiltøk,**
  veitslur og útferðir
- **Familjutiltøk**
  minst tvær ferðir árliga
- **Speed-dating-kapping.**
  Bjóða ymsum starvsfeløgum
  til 10 minuttirs prát og kaffi
- **Vitanardeiling:**
  Imran Rashid um
  sunna skíggjanýtslu
- **Temavikur**
  fleiri ferðir árliga við pynti, mati
  og hugna úr ymsum londum
- **Felags arbeiði**
  fyri at skapa tilvit
  um KT-kunningartrygd
- **Felags arbeiði**
  við strategi, og høvi at siga sína
  erligu meining um gott og ringt
- **Vitanardeiling:**
  Køksdeildin um súrdeiggj
- **Felags deildardagar,**
  har deildirnar greiða frá
  og læra av hvørjum øðrum
- **Morgunsangur:**
  Øll savnast at synga saman

# *Samfelagstilvit í 2025,* stuðul og sponsorat

Betri Trygging er millum sterkastu fyritøkur í landinum, og vit eru fullgreið yvir okkara stóru samfelagsligu ábyrgd. Tí veita vit stuðul til hópatals átøk, tiltøk og verkætlanir. Felagsnevnarin er tó, at okkara íkast skal vera tryggleikaskapandi.

## Sponsorat til tryggleikaskapandi átøk

Á G!-festivalinum, Bátafestivalinum í Vestmanna og Sjómannadegnum í Klaksvík, Tórsfest og Norðfestivalurin hava vit latið ókeypis vatn, brandteppi, fyrstuhjálpartaskur osfr.

## Átakið Skíggjasunn

Almenna átakið „Skíggjasunn", har vit á ymsar hættir settu váðar við ovurnýtslu av skíggjum á breddan. Eitt nú høvdu vit ókeypis og almennar fyrilestrar við serfrøðingunum Imran Rashid og Nicklas Brendborg. Vit skipaðu fyri eini nærveruviku á skúlum og miðnámsskúlum, har vit lótu ymisk spøl fyri at fáa næmingarnar at hyggja upp og vera sama uttan skíggjar.

## Ávaringar

Vit senda javnan ávaringar á SoMið – um alt frá veðri til bátar til ferðslu til eld til ferðaskaðar.

## Sólblómutænasta

Vit vóru millum fyrstu fyritøkur í landinum at veita kundum okkara Sólblómutænastu – og í sambandi við tað fekk starvsfólkið upplæring

## Samstørv um tryggleika

Vit leggja okkum eftir samstørvum um tryggleika – eitt nú við Ráðið fyri Ferðslutrygd, Heilsustýrið, Fólkaskúlar, Miðnám, Ítróttasamband Føroya osfr.







# *Familjuveltan* hjá Betri Trygging

At hava eina felags eplaveltu fyri starvsfólkið rakar nógv góð parometur innan bæði burðardygd, starvsfólkarøkt, felagsskap, rørslu og føroyskan mentanararv. Vit hava tosað um tað leingi, og á vári 2025 tóku vit stigið. Tað eydnaðist so væl, at tað heilt víst verður eitt afturvendandi tiltak, sigur Rannvá Justinussen, HR-leiðari á Betri Trygging.

Á vári 2025 tók Betri Trygging samband við ein bónda á Sandi um at fáa eitt jarðarstykki til eplaveltu. Tað var ikki hálvtalað orð, so var avtalan í hús, og tey knapt 100 starvsfólkini fingu í boði at fáa ein lut av veltuni.

Tá av tornaði søgdu 46 starvsfólk ja-takk. Summi vóru royndir veltarar, meðan onnur royndu seg á fyrsta sinni.

Bóndin velti bøin, Betri Trygging keypti setepli og tøð – og ein eplabólkur varð skjótt stovnaður við fólki, sum høvdu hug og skil fyri eplum og velting. Tey býttu jarðarstykkið upp í smærri partar, so hvør fekk sína egnu lítlu veltu í teirri stóru veltuni.

## At síggja tað vaksa

Ein góðan leygardag var avrátt at fara til Sands at seta niður í felag.

– Hetta var ein góður máti at vera saman við sínum starvsfeløgum, hitta familjurnar hvør hjá øðrum og hava okkurt saman uttanfyri arbeiðið. Tey, sum dugdu, løgdu lag á hjá teimum óroyndu, fólk hjálptust at – og eftir lokið stríð var ein drekkamunnur fyri øll. Tað var so sera væleydnað og ein góður dagur, greiðir Rannvá Justinussen frá.

Serliga eru tað nógv fólk í Havn, sum ikki hava møguleika at velta sítt egna, tí húsini standa so tætt. So hetta var ein sera kærkomin møguleiki at fáa mold undir neglirnar og koma nærri at náttúruni.

Starvsfólkið fekk ábyrgd av sínum egna jarðarluti í veltuni, sum bleiv væl merkt við pelum frá Verkstaðnum Vón - og ígjøgnum summarið fóru fólk so hvør í sínum lagi at lúka og halda eyga við, hvussu slokkarnir vuksu.
– Hugsa vit um tað mentanarliga, so eru epli jú høvuðsparturin av okkara tilfeingi úr jørðini. Alt, sum hoyrir til mold og velting er ein sterkur siðaarvur, ið eigur lívið í okkum, men sum nú er vorðin fremmandur fyri parti av fólkinum. Tí hvussu skalt tú kunna vita nakað um veltur, um tú ikki eigur jørð? vísir Rannvá á.

Við tað, at hetta var skipað sum eitt familjuátak, var tað eisini upplagt at taka børnini ella barnabørnini við.

– Tað hevur týdning, at børnini eisini læra, at tað, vit eta, kemur úr náttúruni – ikki bara av hillini í einum handli. Tað er eisini partur av burðardygga lívinum at vitanin verður latin næsta ættarliðnum, heldur Rannvá.

Og tað er ein serstøk gleði í at eygleiða, hvussu stríðið við at seta niður ber ávøkst – og hvussu slokkarnir vaksa, hvørja ferð man kemur at hyggja. At velta sítt egna skapar eitt samband við náttúruna og eina heilt serstaka gleði, sum eisini merkti prátið á arbeiðsplássinum, hvørjaferð onkur hevði verið suðuri á Sandi og hugt til veltuna. Nú høvdu fólk okkurt at vera saman um, sum ikki snúði seg um arbeiðið, vísir Rannvá á.

## Upptaking

Tilsamans 13.800 epli vórðu sett niður. Ein vakran heystardag fór allur riðilin aftur til Sands at taka upp.

Tá avtornaði vórðu á leið 110.400 epli tikin uppaftur. Tað munar – bæði í pengapungunum og í minni innflutningi.
– Serliga hjá børnunum, sum ikki eru von at taka epli upp, var tað fantastiskt at síggja rúgvuna, sum eitt, einstakt epli var blivið til, sigur Rannvá.

Fólk kundu taka eplini upp aftur sum teimum lysti – alt eftir møguleikum at goyma tey heima. Einasta treyt var, at veltan skuldi vera tóm á nýggjárinum.

Afturmeldingarnar eftir eplaveltuna hava verið framúr góðar – og nógv hava biðið um, at tað skal gerast eitt afturvendandi átak. Nógvur látur hevur staðist av arbeiðinum – serliga tá ið eplini skuldu takast uppaftur og





onkur tók úr skeivum stykki. Og samanhaldið millum starvsfólkið er heilt víst styrkt, tí tey hava arbeitt saman og hjálpt hvør øðrum.

## Tankar aftanfyri

Eitt av strategisporunum hjá Betri Trygging snýr seg um burðardygd – bæði tá umræður náttúru, atferð og mentan.

Í nøkur ár hevur fokus verið sett á heilsu, mat og egið tilfeingið – eitt nú hevur Gutti Winther havt ein fyrilestur um at gagnnýta restir og eta eftir árstíðunum, og Maud Wang Hansen hevur havt ein fyrilestur um at velta egið grønmetið.

– Men vit manglaðu líkasum at seta gerðir handan orðini. Leingi tosaðu vit um at skipa eina veltu, og nú vit hava gjørt tað, er púra greitt, at hetta verður gjørt aftur, staðfestir HR-leiðarin.

– Við eplaveltuni raktu vit fleiri av okkara fokusøkjum bæði í sambandi við starvsfólk, náttúru, siðaarv og burðardygd.

Eplaveltan var sostatt eitt átak, sum gav fleiri flugur við einum smekki.

Ella – kundu vit kanska sagt - fleiri epli undan sama slokki.

# *Falltrygd* fyri eldri borgarar

Eitt av sera góðu stuðulssamstørvum okkara í 2025 var við Judo Føroyar og Pensjónistafelag Føroya.

Talan var um eitt skeið í falltrygd fyri eldri fólk, har tey lærdu at detta.

Skeiðið var fyribyrgjandi - bæði við at sleppa eldru borgarum okkara undan skaða, um tey skuldu dottið, og undan einseminum, sum kemur av ikki at hætta sær út av ótta fyri at detta.

Skeiðini vóru hildin í Havn, Vestmanna, Giljanesi, Klaksvík og Oyrarbakka – og undirtøkan var sera góð. Láturin rungaði, meðan tey eldru lærdu ítøkiligar teknikkir fyri at sleppa undan vanligastu fallskaðunum. Eisini lærdu tey, hvussu tey sjálvu kundu sleppa upp aftur, um óhappið skuldi hent.

Tveir altjóða instruktørar, ið eru vanir at arbeiða við eldri fólki, komu til Føroya at halda skeiðini – og allir fakbólkar, sum dagliga eru um eldri fólk, vórðu eisini boðin við. Eitt nú fysio- og ergoterpeutar, starvsfólk á ellis- og røktarheimum, ítróttalærarar og onnur.

Afturmeldingarnar vóru óalmindiliga góðar.



TALVA 18

## *Starvsfólkahópur*

| Starvsfólkahópur | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Ársverk | Ársverk | 90,46 | 89,87 | 88,47 | B1-24eB8-39 |
| Løntakarar | Stk. | 98,25 | 96,50 | 93,75 | B1-24eB8-39 |
| Fyribils starvsfólk | Løntakarar | 4,13 | 2,83 | 2,33 | B8-39a |
| Fastsett starvsfólk | Løntakarar | 91,79 | 89,21 | 88,54 | B8-39a |
| Lærlingar | Løntakarar | 2,33 | 4,46 | 2,88 | Ikki krav |

Ársverk (pr. starvsfólk): Setanarbrøkur * ("Mðr. í starvi" / 12)
Løntakari (pr. starvsfólk): 1 * ("Mðr. í starvi" / 12)



TALVA 20

# *Kynsbýti*

| Lyklatal | Eind | 2025 | 2024 | 2023 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Menn | Løntakarar | 51,13 | 46,92 | 42,96 | B8-39b |
| Kvinnur | Løntakarar | 47,13 | 49,58 | 50,79 | B8-39b |
| Annað/ ikki skrásett kyn | Løntakarar | - | - | - | B8-39b |
| Kynsbýti | Lutfall (K/M) | 48%/52% | 51%/49% | 54%/46% | B8-39b |
| Kynsbýti á leiðslustigi | Lutfall | 36%/64% | 42%/58% | 42%/58% | C5-59 |

Kynsbýti: Kvinnur / Menn
Vit hava ein málsetning um, at kynsbýtið skal fylgja altjóða viðurkenda 60-40 leistinum



## Øll starvsfólk

| Kvinna | Maður |
|---|---|
| 47 | 49 |
| **48%** | **52%** |



## Toppleiðsla

| Kvinna | Maður |
|---|---|
| 2 | 3 |
| **40%** | **60%** |



## Víðkað leiðsla

| Kvinna | Maður |
|---|---|
| 4 | 7 |
| **36%** | **64%** |

TALVA 22

## *Rættindi hjá starvsfólkum*

| Lyklatal | Eind | Langtíðarmál | 2025 | 2024 | 2023 | VSMEnr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Øll starvsfólk fáa eina løn, sum í minsta lagi er á støði við minstulønina | JA/NEI | JA | JA | JA | JA | B10-42a |
| Starvsfólk, ið eru fevnd av kollektivum sáttmála | % | Øll í viðkomandi fakbólkum | 94% | 94% | 96% | B10-42c |

Allir starvsbólkar, ið hoyra undir sáttmálaøkið hjá YTF, eru partar av kollektiva sáttmálanum, meðan nakrir fakbólkar ikki hoyra undir hendan sáttmála.



# 6. Leiðsla

TALVA 25

## *Leiðsla*

| Eind | Eind | Úrslit 2025 | Úrslit 2024 | Úrslit 2023 | VSME-nr. |
|---|---|---|---|---|---|
| Dómar innan korruptión og mutur | Stk | – | – | – | B11-43 |
| Samlað upphædd fyri bøtur | Kr. | – | – | – | B11-43 |
| Kynsbýti í nevnd | Lutfall | 60%/40% | 60%/40% | 60%/40% | C9-65 |

Kynsbýti: Kvinnur / Menn

Vit hava ein málsetning um, at kynsbýtið skal fylgja altjóða viðurkenda 60-40 leistinum



betri trygging